# X-Factor við Sigrún Brend

**Tá Danmarks Radio í kvøld fer at senda stóru finaluna í X-Factor, sum øll hava eina meining um, so verður Kringvarp Føroya eisini ein partur av hesum. Sigrún Brend verður vertur, og hon fer at atkvøða fyri Lindu**

KAPPING
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Í kvøld klokkan 19 byrjar X-Factor finalan, har Linda Andrews úr Havn fer at royna at syngja seg til ovasta sessin.

Men tað verður ikki bara í DR-býnum og heima í stovunum, at X-Factor verður á skránni. Eisini hjá Kringvarpinum, sum hevur leitað sær á Hvonn til endamálið verður Factor. Tí í finaluni, hevur DR valt at vitja ymisku býirnar, haðani finalistarnir eru. Í Havn verður Sigrún Brend vertur, og Sosialurin hevur tosað við hana um tiltakið.

- Per Zachariassen ringdi til mín, og so tók eg av, tí hetta er ein sera spennandi uppgáva, sigur Sigrún Brend.



*Hárið má gerast, um tú skalt verða vertur í X-Factor*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Onki tvætl**

Vanliga kenna vit Sigrúna Brend frá Degi og Viku hjá Kringvarpinum, har hon er verturin, sum fortelur okkum, hvussu politiska støðan er og so framvegis. So er spurningurin, hvat hon heldur um at vera við í eini sending, sum løgtingsmaður hevur kallað lágmentanarliga imperialsmu frá dønum og onnur hava kallað eina tvætlisending.

- Hetta er onki tvætl. Hetta er ein stuttlig og glað sending, sum øll hava eina meining um, so tað er als ikki ein tvætlisending, sigur føroyska vertinnan í X-Factor.

**Fleiri umførð**

Sendingin verður skipað á tann hátt, at tað verður upp til 10 ferðir, at DR sendir beinleiðis av Hvonn. Men hetta veldst alt, hvussu langt Linda kemur.

- Tað fer at ganga skjótt fyri seg. Vit sleppa ígjøgnum í stutt tíðarbil. Kanska fimm sekund onkuntíð, og 20 sekund aðrar tíðir, so tað verður heilt spennandi at vera við í eini so størari produktión, staðfestir Sigrún Brend, X-Factor vertinna.

**Li til 1212**

Hóast Sigrún Brend fer at hava nógv um oyruni í kvøld, so fer hon at atkvøða.

- Eg fari at skriva Li inn á telefonina, tí so náði eg at senda tað til 1212, sigur Sigrún Brend, sum ongan iva letur vera um, at hon fer at atkvøða fyri føroysku Lindu Andrews.








**Fríggjadagur 27. mars**

15:00 Tíðindi
15:10 Varpið – Nýggj sending
16:00 Tíðindi
16:05 Varpið
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
19:00 Morgunendursending
21:00 Tónleikasending hjá Heimamissiónini. Torfinn Jacobsen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

**Leygardagur 28. mars**

07:00 Tónleikur
10:00 HALLO ØLL børn (e)
10:45 Tónleikur
13:00 Bilradio (e )
14:00 Vinnurasin (e) – Jan Müller leggur til rættis.
16:00 Vinstra Víkiskylda Barbara Holm leggur til rættis
18:00 Finalan í Spurnarrásini (e)
19:00 HVONN LIVE – Sent verður beinleiðis frá Hvonn í Havn.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

**Sunnudagur 29. mars**

07:00 Gospel tónleikur
10:00 Úr skjáttuni (e)
11:00 Tónleikur
13:00 Á Torginum (e)
14:30 Tónleikur
20:00 Reflex (e) – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
21:00 Kelduvaðið
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

NÝGGJ SENDING

**VARPIÐ**

Í dag kl. 16.10

Varpið er nýggj sending, sum verður gjørd í samstarvi við Televarpið.

Gestur í Rásarúminum verður Laila Hentze, stjóri í Televarpinum.

Eisini verður Fokus sett á X-Factor finaluna.

hvonn LIVE

**Hvonn Live**

Leygarkvøldið kl. 19.00

Hvonn Live hevur hesaferð vitjan av Anniku Mittún, útvarpsstjóra, songkvinnuni Eivør Pálsdóttir og Teimum av Kamarinum.

**Bilradio**

Leygardagin kl. 13.00

Í sendingini er samrøða við danska kappkoyraran Jason Watt um hansara karrieru og um álvarsligu ferðsluvanlukkuna, tá hann breyt ryggin og gjørdist avlamin. Eisini er prát við Eyðun Hansen frá Bygma í Hoyvík um nýggja handverkarahandilin.

Prát er eisini við Kristján Eiriksson frá Tórshavnar Sløkkiliði um ein brandbil, sum verður sendur til Albania.

RÁS 2 ...títt radio